HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

25. oktober 2016
Mál: 16/01214-2
Viðgjørt: KHP

**Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um burturbeining av kloakkspillivatni frá skipum o.ø.**

Hjálagt veður sent til hoyringar uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um burturbeining av kloakkspillivatni frá skipum o.ø. (Linari krøv til skip í innanoyggja rutusigling)

Møguligar viðmerkingar skulu vera Heilsu- og innlendismálaráðnum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 28. november 2016.**

**Orsøkin** til at hetta máli er tikið upp er, at umhvørviseftirlitið hjá Vørn umborð á onkrum skipi hjá Strandfaraskipum landsins hevur varpað ljós á, at tað finnast fleiri strandfaraskip í innoyggja sigling, sum ikki lúka krøvini í kunngerðini um útbúnað til viðgerð av kloakkspillivatni.

Landsstýrismaðurin í samferðslumálum hevur tí spurt, um til ber í lóggávuni at bera so í bandi, at strandfaraskipini ikki koma undir krøvini frá 2005 um viðgerð av kloakkspillivatni í góðkendari skipan og um skipini ikki kunnu halda fram við at burturbeina óviðgjørt kloakkspillivatn á sjógv, soleiðis sum tað áður hevur verið loyvt.

**Møguligar loysnir**
Umhvørvisstovan hevur viðgjørt fyrispurningin, og er komin eftir, at tað í høvuðsheitum finnast tvær loysnir at loysa trupulleikan við burturbeining av óviðgjørdum kloakkspillivatni hjá strandfaraskipunum:

1) Álagt kann verða strandfaraskipum at goyma kloakkspillivatnið umborð og so tøma hetta í land í eina góðkenda móttøkuskipan,
2) MARPOL Annex IV heimilar einum landi at seta linari reglur í gildi fyri skip, sum ikki sigla í altjóða sigling.

Loysn 1 kann verða trupul at fáa at virka so skjótt og smidligt, sum ynskiligt er, bæði tí útbúnaðurin umborð á ymisku skipunum ikki er so væl innrættaður til goymslu og tøming av júst kloakkspillivatni, tí í summum førum verða ymisku sløgini av spillivatni ikki hildin atskild í ymiskum skipanum.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

Loysn 2 er gjørlig, tí Annex IV heimilar einum landi at seta linari reglur á egnum sjóumveldi. Tí er loysn 2 vald.

**Onnur broyting**
Allýsingin av § 2, stk. 2 er rættað og nágreinað, tí hon var ikki nóg neyv frammanundan.

Ein nýggj orðing er gjørd av § 7, tí tað er ein gloymska, at útlendskir myndugleikar ikki eru tiknir við sum heimilaður góðkenningarmyndugleiki til skipanir og útgerð hjá útlendskt skrásettum skipum.

**Avleiðingar av broytingini**
Við broytingini fáa strandfaraskipini ein linna í mun til altjóða viðgerðarkrøvini, men kortini skulu ávís umhvørviskrøv haldast fyri goymslu og burturbeining av kloakkspillivatni.

Mett verður ikki, at broytingin fer at hava munandi avleiðingar fyri umhvørvið, við tað, at nøgdin av kloakkspillivatni er avmarkað, og tømingin fer fram á økjum, har spillivatnið verður ført burtur við streyminum.

Vørn fer framvegis at hava umhvørviseftirlit við, at strandfaraskipini halda nýggju og linari krøvini.

**Avleiðingar fyri onnur**
Hildið verður ikki, at broytingin hevur avleiðingar fyri onnur.

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri